# Tórshavnar kommuna avreiðir vitanarvinnur til Danmarkar

ALBERT ISFELD
arkitektur
Listi E



**Vit hava í seinastuni sæð, hvussu Tórshavnar kommuna sendir byggiuppgávur av landinum og harvið niðurbrýtur vitanarvinnu, sum vit eftir tógvið stríð hava uppbygt. Tað er borgarin í Havn sum betalir eyka fyri hesi mistøk**

Vit hava sæð, hvussu Tórshavnar kommuna avreiðir tað eina arkitektaprojektið fyri og annað eftir til Danmarkar og ofta eisini til arkitektateknistovur í Danmark, sum onkur á byggideildini hevur útvalt at verða serliga kompitenta.

Seinasta dømið er ítróttarhøllin á Nabb. Í bløðunum stóð at lesa, at tann valda danska teknistovan hevði serligan førleika at um- og útbyggja ítróttarhallir.

Projektið bleiv sett í gongd, og arbeiðið at byggja høllina bleiv boðið út. Fyri tað fyrsta bleiv høllin alt ov dýr, og síðan funnu fólk innan ítróttin útav, at høllin ikki lúkaði international krøv – **hevur byggideildin sovið í tímanum?**

Her síggja vit, hvussu Tórshavnar kommuna á ókompitentan hátt oyðslar við peningi borgaranna – projektið bleiv skrottað, og eg havi lisið í bløðunum, at tær 5 milliónir krónurnar, sum projektið kostaði – her er helst ikki roknað við ferða- og logiútreiðslum og øðrum logistikkpengum vegna langa avstandin til Danmarkar - endaðu í ruskspannini.

Nú er avrátt, at annað danskt felag – enn einaferð - skal taka sær av ítróttahøllini og seta hana við endan av Tórsvølli. Spennandi verður, hvat hon nú fer at kosta, og hvussu hon fer at síggja út, tí nú eru arkitektarnir settir á síðulinjuna.

Vit hava nógvar arkitektateknistovur, sum hava veruligan førleika at projektera øll tey verkevnini, sum Tórshavnar kommuna nú avreiðir av landinum til danskar arkitektar.

Vit finna okkum ikki í, at okkara arkitektar, sum gjalda skatt í Føroyum, verða forfordeildir í mun til danskar arkitektar, sum ongan skat leggja eftir seg her, og sum í omanfyri nevnda dømi um ítróttarhøllina, ikki hava førleikan at projektera arbeiðir, sum kommunan av duldarfullum ávum er farin til Danmarkar eftir – **hevur byggideildin sovið í tímanum.**

Vit vilja gjarna hava kapping í arkitektafakinum – tað stimbrar og gevur nýggja innspræning, men vit halda, at tað er ongin grund til at fara til onkran arkitekt í Danmark at geva honum uppgávur undirhonds her heima, teir hava nokk at gera at byggja teirra egna land upp, og vit fáa ongar uppgávur undirhonds úr Danmark.

Vit halda heldur ikki, at tað er nøkur grund til, at kommunan/byggideildin ger heimagjørdar kappingarhættir, sum av sær sjálvun gera, at uppgávurnar enda í Danmark.

Tað skal standa púra greitt, at vit vilja kapping innanlendis í Føroyum um arkitektauppgávur, tá ið uppgávan er so vorðin, at rætt er at gera kapping.

**Tað skal eisini vera púra greitt, at vit eru fyri, at uppgávur við serligum symbolvirði, verða bodnar út í arkitektakapping eisini uttan fyri Føroyar, og tá hugsi eg fyrst og fremst í norðanlondum og ikki bert í Danmark, tí tá fáa besta úrslitið og inspiratión – vit kunnu bert hyggja at Norðurlandahúsinum, sum normaðurin Ola Sten teknaði – eitt gott dømi.**

Latið okkum fyri guds skyld sleppa av við hasar heimføðisligu kross og bolla kappingarnar, sum juristarí og bókhaldarí í kommununi kunnu tøssa saman – latið okkum fara aftur til arkitekturin, byggilistina, skynsemi.

Latið okkum útbúgva byggideildina í Tórshavnar Býráð, so hon fær førleikan at fyrireika kappingar, og hon kann fáa hjálp frá Arkitektafelag Føroya og øðrum góðum fólki í Føroyum.

**Og ikki at gloyma: her eru milliónir av skattgjaldarakrónum at spara.**

Eg vil arbeiða fyri at byggilistin í Havn aftur kemur á dagsskránna.

# Vilja hava Norrønu til Klaksvíkar

JAN A. JOENSEN
formaður, Norðoya Sjálvstýrisfelag

**Norðoya Sjálvstýrisfelag heitir á tingið um at bera so í bandi, at landskassa íløgan í Smyril Line verður eitt íkast til útjaðaran, og at virkað verður fyri størri reglusemi í sambandi við rutusiglingina**

Nú Føroya Løgting hevur samtykt at bjarga Smyril Line undan húsagangi, heitir Norðoya Sjálvstýrisfelag á tingið um at gera Norðhavnina í Ánunum til heimstað og fast atløgupláss hjá Norrønu.

Við hesum hevði íløgan hjá landskassanum gjørt størst gagn, bæði hjá landinum og felagnum, Smyril Line.

Høvuðskommunan í Norðuroyggjum, Klaksvík, er eitt øki í landinum, sum í løtuni hevur stóran tørv á at verða styrkt. Vinnulívið í Klaksvík hevur tørv á beinleiðis atgongd til av- og áskiping, og er tað einki meira enn rímiligt, at Norðuroyggjar fáa sín part av ágóðanum av gjøldum í sambandi við farma- og ferðaflutning, nú tað almenna setir pening í hesa vinnu.

Víst verður til tøl frá Hagstovu Føroya, sum vísa, at kommunurnar í Norðoyggjum eru tær kommunur í Føroyum, ið eru mest tengdar at tilfeingisvinnuni. Harafturat er Klaksvíkar kommuna komin í fíggjarligt óføri, samstundis sum at útlitini fyri tilfeingisvinnuna eru døpur.

Eisini verður víst til, at Norðhavnin er ein veðurgóð havn, sum kann tryggja skipi og ferðafólki reglusemi. Við at gera Norðhavnina til fast atløgupláss hjá Norrønu, gerast møgueikarnir betri at røkka endamálinum í samgonguskjalinum, har tað millum annað stendur:

- at við verandi búskaparstøðu er neyðugt, at tað almenna ger íløgur, ið kunnu vera við til at seta gongd á virksemið kring landið.

- at haldast skal fram við arbeiðinum at marknaðarføra Føroyar í útflutnings- og ferðavinnuhøpi, soleiðis at vit fáa greiðan kappingarsamleika.

- at ein yvirskipað ætlan fyri menning og marknaðarføring av Føroyum og ferðavinnuni verður gjørd, so hon kann gerast vinnuligt íkast fyri alt landið.

Sum høvuðspartaeigari í Smyril Line hevur Føroya Landsstýri nú ein góðan møguleika at vísa, um samagongan meinar nakað við hetta, sum stendur í samgonguskjalinum.

# Havnarfólk veljið Levi Mørk

LEVI MØRK



Vælsignaður Levi.

Tú hoyrur heima í Eysturoynni. Her íður av børnum við serligum tørvi, sum ONKI tilboð hava av nøkrum slag. Mammur mugu ganga heima, tí onki tilboð er til børnini - ongin kommunalpolitikari (politikari yvurhøvur) vil kennast við børn okkara. Havið lisi alt tilfarið, sum uppstillaranir her í Runavíkar kommunu blaka í okkara postkassar og fjølmiðlanar.

ONGIN av teimum nevnur børn við serligum tørvi. So eg atli mær á val týsdagin og stemma blankt, fyri at vísa mína ónøgd.

Vit her inni fáa ONGA hjálp/tilboð frá Sernámsdeplinum, so fyri mína skyld, kann Sernámsdepilin ikki vera til. Sorry, men so nógv havi eg til yvurs fyri Sernámsdeplinum. Hopi tú gert eitt knall gott val í Havn og stillar upp í Runavík um 4 ár.

SO HAVNAFÓLK VELJIÐ LEVI MØRKw

# Almenn uppílegging

ZAKARIAS WANG



Tað almenna skal síggja til, at vit hava havnir, sum eru so stórar og tryggar, at tað ber til hjá skipum at koma til og frá. Fyri tað, sum lagt er út til hesar havnir, skal nýtslugjald takast, so tey, sum hava hug til at seta framleiðslufaktorar inn í flutningsvinnuna, gjalda kostprís fyri tað sum er lagt út, og tí ikki fáa studning frá skattgjaldarunum. Harvið sleppa tey framat, sum duga nóg væl í kappingini.

Allar royndir vísa, at tað almenna hevur nógv týdningarmikið at taka sær av, men at rakstur av fyritøkum ikki er nakað, sum politikarar duga til. Hetta vóru okkara royndir av kongliga monopolhandlinum, og einki er batnað síðani.

Eru vit fyrst komin inn á studningsglíðibreytina, er ringt at støðga aftur. Tá vit hava veitt tær fyrstu sjúti milliónirnar, hví skulu vit so ikki játta ta næstu? Men vit skulu minnast til, at hvør tann einasta króna verður tikin frá skattgjaldarunum og hevði kunnað gjørt gagn aðrastaðni í samfelagnum.

# Hin órøkti Knørrur - eitt aftursvar

HØGNI MIKKELSEN
býráðslimur, valevni Sambandsflokksins



Góði Petur í Gong, nevndarlimur í Róðrarfelagnum Knørri og valevni fyri Tjóðveldi til býráðssvalið í Tórshavnar kommunu.

Eg vil siga beinanvegin, at eg eri sera harmur um, at Róðrarfelagið Knørrur ikki hevur fingið betri viðferð seinastu fýra árini, henda býráðssamgongan hevur sitið. Men góði Petur, tín egni flokkur hevur sitið við leiðsluni í býráðnum hesi árini, men hevur einki givið tykkum.

Eg haldi ikki, tað er rætt, at Róðrarfelagið Knørrur verður viðfarið soleiðis, sum tað verður. Eg skal gera púra greitt, at eg havi størstu virðing fyri tí ungdómsarbeiði, sum Róðrarfelagið Knørrur ger og stendur fyri.

Men fyri fýra árum síðan syrgdi Sambandsflokkurin í býráðnum fyri, at næstan alt kom upp á pláss við Róðrarfelagnum Knørri. Tit skuldu byggja nýtt neyst við Lágu kai. Tað vóru bert smáting eftir, men so vórðu tit svikin av verandi samgongu við Heðini Mortensen fyri Javnaðarflokkin og umboðum fyri Tjóðveldi á odda.

So Petur og øll í Róðrarfelagnum Knørri! Um tit vilja hava framburð og ikki minst virðing fyri tykkara fantastiska arbeiði, so skulu tit velja eitt umboð fyri Sambandsflokkin!

Gott val.